# LÓGIR

fyri

# NORÐSTREYMOYAR SAMBANDSFELAG

§ 1

Navn felagsins er
»NORÐSTREYMOYAR SAMBANDSFELAG«

§ 2

Felagsins endamál er, at fáa sambandssinnað fólk at standa saman í eini samskipan, til frama fyri Sambandsfloksins politikk, so sum hesin er lýstur í stevnuskrá floksins, og í hesum sambandi saman við øðrum sambandsfeløgum at samráðast um og fyrireika uppstilling av valevnum til fólkating, løgting, sóknarstýrir og aðrar kommunalar nevndir.

§ 3

Einhvør, ið er yvir 18 ár, og sum góðtekur endamál felagsins sambært grein 2, kann gerast limur. Atkvøðurætt fær limur, tá hesin hevur verið limur í 3 mánaðir.

§ 4

Árliga limagjaldið verður ásett á aðalfundinum.

§ 5

Felagið verur stjórnað av upp til 7 limum, umboðandi hvør sína kommunu í Norðstreymoy. Hvør nevndarlimur hevur rætt til sín tiltakslim, umboðandi sína kommunu. Nevndarlimir umboðandi Vestmanna, Hvalvík, Saksun og Haldórsvík, saman við tiltakslimum, standa fyri vali líka ár. Nevndarlimir og tiltakslimir umboðandi Kvívík, Kollafjørð og Hósvík, standa fyri vali ólíka ár.

Aðalfundurin velur 1 grannskoðara.

Á fyrsta fundi eftir aðalfundin skipar nevndin seg við formanni, næstformanni, kassameistara og skrivara. Lógir felagsins kunnu bert broytast á aðalfundinum.

§ 6

Aðalfundurin hevur hægsta ræði í øllum felagsmálum. Hin vanligi aðalfundurin verður hildin á hvørjum ári í seinru helvt av februar mánaði, og boða verður frá honum í minsta lagi 14 dagar frammanundan og lýst í bløðunum. Uppskot til aðalfundin skulu verða formanninum í hendi áðrenn 1. februar.

Á fundarskránni til vanliga aðalfundin vera hesi punkt:

1. Formansfrágreiðing
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi
3. Val av nevnd, tiltakslimum og grannskoðara
4. Møgulig uppskot frá nevnd ella limum
5. Ásetan av árliga limagjaldinum
6. Ymiskt

Til at taka avgerð krevst vanligur meiriluti, tó krevst til lógarbroytingar, at í minsta lagi helvtin av øllum limum við atkvøðurætti atkvøða fyri. Møta ikki nóg nógvir limir til at fremja lógarbroytingar, verður at lýsa til eykaaðalfundar sambært grein 7.

Uppskot til lógarbroytingar skulu sendast skrivliga og skulu verða formanninum í hendi innan 1. januar.

## § 7

Eykaaðalfundur kann við 14 daga freist verða hildin um nevndin heldur tað vera neyðugt ella um minst 10 limir skrivliga ynskja tað.

Avgerðir, ið vera tiknar á eykaaðalfundum, hava gildi tá minst 2/3 av teimum møttu limunum við atkvøðurætti atkvøða fyri.

## § 8

Nevndin hevur dagligu leiðsluna av felagnum.

Nevndin teknar nýggjar limir og avgerð, um viðkomandi kann gerast limur, samsvarandi grein 3.

Endalig avgerð kann tó leggjast fyri aðalfundin ella eykaaðalfund.

Stendur á jøvnum, tá ið atkvøtt verður á nevndar-fundum, er atkvøðan hjá formanninum avgerandi.

## § 9

Eru fleiri veljarafeløg í sama valdømi, velur felagið umboð til saman við umboðum frá hinum feløgunum at fyrireika uppstilling til tey í grein 2 nevndu val.

Samtykt á eykaaðalfundi í Vestmanna 15. apríl 1996.